

*Børnini í Norðskála-Oyrar skúla bæði slógust og sparkaðust fríggjadagin, tá tey royndu seg sum stuntfólk*

# Stuntmenn á Oyrarbakka

Fríggjadagin var stuntdagur í Norðskála-Oyrar skúla. Danin Jørn Muhl, ið er lærari og ofta undirvísir í stuntum var á vitjan á skúlanum, har børnini frá fimta til tíggjunda flokk sluppu at royna seg sum stuntfólk.

Fólkini á skúlanum vóru sera fegin um vitjanina, sum loyvdi teimum at uppliva nøkur øðrvísi og áhugaverd ting, sum vóru stuttlig.

Jørn Muhl greiddi frá, at stunt er eitt fyribrigdi, sum er eitt millumting millum fimleik og sjónleik, har mann sannførir onnur um at hendingar fara farm, sum ikki eru heilt veruligar.

Hetta stendur millum annað á heimasíðuni hjá skúlanum.

# Styttri valstríð

## Einfaldari uppstilling og hægri tinggátt

Løgtingsvallógin skal broytast, og í gjár legði Annika Olsen, landsstýriskvinna í lógarmálum uppskot fyri tingið.

Í uppskotinum verður millum annað skotið upp:

At stytta freistina fyri at útskriva løgtingsval úr 6 til 8 vikur niður í 3 til 5 vikur. At áseta eina fasta tinggátt, soleiðis at flokkur sum fær minni enn 4 % av samlaða atkvøðutalinum, ikki fær umboð á tingi.

At gera uppstillingarmannagongdina einfaldari soleiðis, at flokkar sum hava umboð á tingi ella eru góðkendir, ikki skulu hava stillarar tá stillað verður upp. At áseta at uttanflokkalistar, fyri at stilla upp, skulu hava undirskriftir frá millum 400 og 450 veljarum.

At áseta at valkort skulu nýtast, umframt aðrar tekniskar broytingar sum eru avleiddar av at útskrivingarfreistin verður stytt.

# Elin í Stórustovu er 8. mars kvinnan 2009



Lesarar á Kvinna.fo vóru ikki í iva um, hvør skuldi vera 8. mars kvinnan í 2009. Elin í Stórustovu lá klárt á odda í atkvøðugreiðsluni. Dómsnevndin kom til sama úrslit. Elin í Stórustovu er tí 8. mars kvinnan 2009.

Annleyg Lamhauge, blaðstjóri á Kvinnu, handaði Elini vøkru 8. mars hálssmúkkuna, sum Niels L. Arge hevur gjørt serliga til 8. mars kvinnuna.

- Eg eri bæði kløkk og rørd, segði ein tíðiliga fegin Elin í Stórustovu, tá Kvinna kom á gátt at heiðra hana.

- Tá tú stingur nøsina fram og ert nógv frammi í fjølmiðlunum, so er skjótt at fáa nøkur klams yvir fingrarnar, og tað havi eg eisini fingið. Tí vermir hendan viðurkenningin nógv, sigur Elin. Grundgevingarnar hjá dómsnevndini fyri at hava skotið Elina í Stórustovu upp vóru hesar:

»Elin er ein ung kvinna, sum ikki fýrir fyri at taka sera eym mál upp í almenna rúminum. Elin er við til at broyta hugburðin hjá føroyingum um, hvat er tabu og ikki. Hon fær ung til at tosa um kropp og seksualitet, og ger at ungar kvinnur gerast meiri seksuelt tilvitaðar og frígjørdar.«

Dómsnevndin leggur í kjósanini afturat, at Elin ger ein stóran mun í tilvitanini hjá unga ættarliðnum av gentum og kvinnum. Júst hetta arbeiðið hevur so ómetaliga stóran týdning fyri framtíðar støðuna hjá føroysku kvinnuni.

Í dómsnevndini sita: Urd Johannesen, Tina K. Jakobsen, Turid Debes Hentze og Annleyg Lamhauge. Kvinna ynskir Elini í Stórustovu hjartaliga tillukku við heiðrinum stendur í tíðindaskrivi frá blaðnum. Eisini Portalurin ynskir starvsfelaganum Elini tillukku.

